# Føroyingar annaðpláss í European Business Game



*Tey luttakandi úr Føroyum vóru: Kristian Eysturoy, Maria Brim Joensen, Sjúrður Jacobsen, Mannbjørn Anthoniussen og Kenneth Jørgensen*

**29. juni var endakappingin í European Business Game International, ið hesaferð var hildin í Inverness í Skotlandi.**

ÚTBÚGVING
*Theodor E. D. Olsen*
*Theodor@sosialurin.fo*

Fimm Næmingar, sum ganga í Tekniska Skúla, í Klaksvík løgdu sína virkisætlan fram í kapping við 8 onnur ung virki í Europa, og gjørdust tey nummar tvey í harðari kapping við Skotland, ið vann kappingina við virkinum Vida Nova, sum framleiðir eina trygdarskipan til bilar, ið økir um trygdina, tá koyrt verður í ringum sýni.

Hugskotið hjá næmingunum á Tekniska Skúla í Klaksvík var eitt virki nevnt Quality Marine Woolwear, ið framleiðir ullintar draktir, framleiddar úr reinari føroyskari ull, at leggja í bjargingarbátar. Hini hugskotini vóru úr Grønlandi, Danmark, Skotlandi, Italia, Tyrol, Kroatia, Slovakia og Kekkia.

## Brenni og flótandi linsur

Hugskotini vóru sera ymisk, verður sagt í tíðindaskrivi. M.a. var virkið hjá teimum ungu úr Grønlandi eitt felag, ið skipar fyri "Teambuilding", til virki og fyritøkur kring heimin, har luttakararnir fáa avbjóðingar í grønlendsku náttúruni. Danska hugskotið var ein teldubók, kroatarnir høvdu eitt virki, ið selur bílig hús, ið eru vøkur og við høgari góðsku, til vanligu familjuna í Kroatia. Úr Italia var hugskotið ein brandtryggur tendrari til brenniovnar, Tyrol hevði ment ein hava, til tøkini á háhúsum, Kekkia hevði ment einar flótandi kontaktlinsur, og Slovakia hevði gjørt eitt virki, ið framleiðir brenni til ovnar og opnan eld, ið ikki dálkar og er vistfrøðiligt.

Næmingarnir úr øllum luttakaralondunum hava verið saman í 5 dagar og hava havt høvi til at knýta sambond og netverk londini millum. Vitjanin í Skotlandi hevur m.a. givið innlit í skotska søgu og mentan, og vitja hevur verið á virkjum og á einum íverksetaradepli, har m.a. politikarar og leiðandi fólk úr skotsku vinnuni luttóku. Eitt av virkjunum, ið høvið var at síggja, var stovna av einum 21 ára gomlum dreingi, ið vann EBG kappingina fyri trimum árum síðan.

Borgarstjórin í Inverness vísti tiltakinum áhuga, við at bjóða øllum ein døgurða í býráðshøllini.

Tey luttakandi úr Føroyum vóru: Maria Brim Joensen, Kenneth Jørgensen, Sjúrður Jacobsen, Mannbjørn Anthoniussen og Kristian Eysturoy. Lærararnir hjá bólkinum vóru Karin Kirke Petersen og Olga Biskopstø.





*Føroyski fólkatingsmaðurin Høgni Hoydal hevur sett uttanríkisráðharranum fyrispurning um Merkið, sum veittraði undir Dannebrog*

# Høgni Hoydal spyr uttanríkisráðharran um Merkið

**Tjóðveldisumboðið á Fólkatingi hevur sett Per Stig Møller fyrispurning um, hvønn leiklut danska uttanríkistænastan hevði, tá Dannebrog og Merkið veittraðu á somu stong á Rodos.**
**- Eitt hendiligt óhapp á einum privatum hotelli, sigur løgmaður, sum ikki ger nakað við málið**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið visti Dimmalætting at siga, at Merkið hevði veittrað undir Dannebrog á eini flaggstong uttan fyri eitt hotell á Rodos, har oyggjaleikir verða hildnir í hesum døgum.

Sambært Dimmalætting hevði hotellið fingið boð frá donsku ambassaduni á Rhodos um hetta.

Eingin donsk ambassada er kortini á Rodos. Tó eru danir umboðaðir á oynni við einum konsuláti.

## Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne

Hendingin hevur havt við sær, at Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, í morgun hevur sent danska uttanríkisráðharranum, Per Stig Møller, skrivligan fyrispurning um hendingina.

Í tíðindaskrivi frá Norðuratlantsbólkinum verður m. a. sagt, at hetta verður gjørt »eftirsum danskir myndugleikar verða sagdir at hava givið hesi boð, og onki mótmæli hevur verið at hoyrt frá løgmanni ella øðrum úr landsstýrinum, ið annars eru stødd á Rhodos«.

Í sjálvum fyrispurninginum verður m.a. spurt, hvønn leiklut danska uttanríkistænastan hevur havt í hendingini, og um hetta er ein avleiðing av »den nye lovgivning mellem Danmark og Færøerne, hvor den siddende færøske landsstyrekoalition har accepteret at optræde under betegnelsen "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne«.

## Politisk agurkutíð

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er verji hjá føroysku ítróttini og hevur tí valt at vera til staðar undir oyggjaleikunum. Í telefonsamrøðu við Sosialin sigur løgmaður, at hann metir hendingina vera eitt hendiligt óhapp á einum privatum hotelli. Hann minnir á, at tað ongantíð eigur at koma fyri, at tvey fløgg skulu veittra á somu stong, og tí harmast hann um hetta. Men hann ætlar ikki at fara víðari við málinum eins og Høgni Hoydal.

- Tað er politisk agurkutíð hjá Høgna Hoydal, og hann slær politisk platt upp á hetta, sigur løgmaður, ið annars sigur seg hava sæð Merkið vundið á stong alla aðrastaðni, hann hevur ferðast á Rodos.

- Hatta bleiv rættað, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki sigur seg tíma at gera meira við hendingina.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Høgna Hoydal til sjónarmiðini hjá løgmanni, áðrenn blaðið varð prentað.

# Maður stungin

**Vikuskiftið hevur verið sera ófriðarligt, og politiið hevur ikki sitið hendur í favn. Ein maður varð stungin undir húsaófriði, og ein kvinna varð varðhaldsfongslað.**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hóast vakthavandi á politistøðini í Havn ikki veit tað nógva at siga um fólk, ið hava koyrt við kenning um vikuskiftið, so hevur løgreglan havt úr at gera. Av støðini siga tey, at nógv fólk hevur verið í býnum í høvuðsstaðnum. Ikki minst verða nógvar veitslur hildnar við ungdómum, ið eru hátíðarhalda lokna miðnámsútbúgving, og hetta sæst aftur í hagtølunum hjá politinum, verður sagt.

Ógvusligasta hendingin um vikuskiftið man helst vera, at løgreglan varð boðsend at skilja eitt par, sum var farið til hendurs. Húsaófriðurin endaði við, at annar parturin endaði á Landssjúkrahúsinum, meðan hin parturin varð settur fyri ein dómara, sum avgjørdi at varðhaldsfongslaviðkomandi til 12. juli. Grundlógarhoyringin var fyri stongdum hurðum.

Sum Portalurin skilir, hevði ein kvinna stungið ein mann við knívi. Sambært løgregluni er støðan hjá manninum støðug, og hann er ikki í lívsvanda.

Kriminialpolitiið, sum arbeiðir við hesum málinum, vil ikki siga ov nógv, so at kanningararbeiðið verður órógvað, men sum skilst verður kvinnan skuldsett fyri grovan harðskap.